


**Nr. 5** ***3. mars 2024*** **84. árg.**

# Bøn gevur vøkstur

*Frank Henning Holm*

Gjøgnum alla Bíbliuna síggja vit, at Gud svarar upp á bøn. Gud vil, at vit skulu vera bundin at honum og lata ynski okkara og stúranir stíga upp til hansara við tøkk í hjørtum várum.

Fyri trimum árum síðani (2006) byrjaði eg arbeiðið at fyrireika 100 ára haldið hjá hvítusunnurørsluni („Pinse for alle“). Samstundis byrjaðu ein starvsfelagi og eg eina fyritøku uttan fyri Oslo – vit fóru undir at selja hús. Vit høvdu stórar visjónir, men heldur lítið av peningi. Vandin fyri, at tað kundi miseydnast, var stórur.

Tá gjørdu vit av, at vit skuldu seta bønina fremst á arbeiðsplássinum. Vit innrættaðu eitt møtirúm við nøkrum einfaldum stólum, einum pappírskrossi, sum ein listamaður hevði gjørt, og einum borði, sum vit brúktu til altar. Ljós keyptu vit eisini. Gud er ikki bundin at slíkum tingum; men tað kann vera eitt virðismikið samband fyri okkara egnu trúgv.

Tað týdningarmesta var, at vit fóru undir at biðja og at leggja okkara dagliga arbeiði fram fyri Gud. Hetta var einki bragd frá okkara síðu, men eitt neyðarróp til Guds, at hann av sonnum mátti vera við okkum í tí, sum vit gjørdu.

Heilt skjótt byrjaðu vit at fáa bønarsvør. Hjá fyritøkuni merkti tað almenna góðkenning, sáttmálar og fíggjarmøguleikar. Fyri „Pinse for alle“ merkti tað virkisfús sambond tvørtur um nógvar ymsar kirkjur í øllum landinum, sum settu í verk nógv hundrað tiltøk úr norðri í suður. Tá ið vit líta aftur um bak, mugu vit bara geva Gudi æruna – tað var hann, sum læt tað eydnast. Hann svaraði bønum okkara og gav vøkstur.

Sum tíðin leið komu kommunupolitikarar, fólk úr almennu fyrisitingini og vinnulívsfólk til okkara. Tey, ið vóru kristin, vildu fegin biðja saman við okkum í bønarrúminum. Og mong eru tey, sum hava upplivað, at Gud nam við tey hesi árini, til frelsu, endurnýggjan og grøðing. Tey, ið vóru meira ivingarsom, vildu, ið hvussu er, kaga inn í bønarrúmið, tí tey høvdu hoyrt, at vit brúktu nógv av okkara tíð har. „Á, er tað soleiðis, at tað sær út her, ja," søgdu mong.

Fleiri hava tikið hugskotið um bønarrúm við sær inn í egnu fyritøkur sínar, og vit fáa støðugt fráboðanir, at fólk hava stovnað bønarrúm í virkjum og í almenna vinnulívinum. Ein kona í NRK vitjaði okkum í heyst. Hon visti um ein annan kristnan persón í NRK, so tey gjørdu av at fara at biðja. Á næstan møtinum komu 8 luttakarar. Til jóla fekk eg eina heilsan frá henni. Tað vóru 25, sum komu á triðja bønarmøtið í NRK!.

Tað er ein nýggj tíð í landinum. Guds ríki hevur framgongd, har tú ikki væntar tað. Á arbeiðsplássum, í mentunarhúsum, á hotellum og í heimunum. Hetta er, sum tá ið Hans Nielsen Hauge var uppi á døgum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Kallið og hjúnalagið

Tá ið Gud skapaði okkum, legði hann nøkur evni, nakrar talentir niður í okkum, og hann skuldi helst fingið sítt aftur við rentu. Harumframt hevði hann eina ætlan fyri hvønn einstakan okkara (Jer. 29,11), og vit mugu biðja Gud um, at vit ikki stíga út úr hansara ætlan, tí tá gerast vit sjálv ólukkulig. Vit koma ikki til tað, vit vóru ætlað til.

Sjálv plagi eg at biðja: „Harri, lat dyrnar aftur fyri mær, har tú ikki vilt, at eg skal fara, og lat dyr upp, har sum tú vilt hava meg at fara."

Jens Garnfelt, ein danskur pastorur, segði einaferð í sjónvarpinum: „Tá ið tú hevur eitt kall frá Gudi, mást tú bara gifta teg við einum, sum hevur sama kall, annars kemur tú at gjalda ein alt ov høgan prís, tí tá vilja hjúnafelagarnir draga hvør sín veg."

Ein føroyskur trúboðari segði tað soleiðis: „Eg takki konu míni fyri, at hon hevur givið mær rúm, at hon hevur givið mær fríar ræsur at virka fyri Harran, so eg kann liva mítt kall út."

Harrin hevur skapað øll, og hann veit, hvør ið hóskar akkurát til tín eins og tveir brikkar, ið eru trýstir niður í hvør annan og liggja lið um lið í einum puslispæli.

*Effie Campbell.*

# Ert tú nøgdur?

*„Hetta sigi eg ikki av teirri grund, at mær hevur trotið; tí at eg havi lært at vera nøgdur við tað, sum eg havi.“ Fil.4,11.*

Tað er lætt at vera nøgdur, tá ið lívið lagar seg soleiðis, sum vit ynskja; men hvussu ofta hendir tað? Bíblian sigur, at vit skulu venja okkum í at „vera nøgd við tað, sum vit hava.“ Fil. 4,11. Tí um tú setir lívið á standby og bíðar eftir, at tíni ynski skulu ganga út, kanst tú koma at bíða rættiliga leingi. Grikski heimspekingurin Epikur segði: „Oyðilegg ikki tað, sum tú hevur, við at brellast eftir tí, tú ikki hevur. Minst til, at tað, tú hevur nú, fyrr var tað, sum tú vónaði at fáa.“

Ver ikki so slúkin. Um tú alla tíðina hugsar um tað, tú ikki hevur, gleðir tú teg ikki um tað, Gud longu hevur givið tær. Ver nøgdur! Tað er í lagi at seta sær mál. Men gevst við at hugsa alt ov inniliga um endaúrslitið, og lær teg at prísa Harranum, meðan tú ert á veg móti málinum.

*Effie Campbell* umsetti.

# „Hesi orð eru trúverd og sonn.“

*Opb. 21,5 V.D.*

Eg kann sissa teg og siga tær, at orðini omanfyri eru ikki nakað, sum eg sigi, men tey sipa til Guds Orð frá 1. Mós. 1,1 til Opinberingina 22,21.

So um tú trýrt Darwini og hansara evolutiónsteori, so trýrt tú ikki Opinberingini, sum sigur okkum, at henda verð hevur ein „seinasta søludag“, tíðin er farin frá hesi verð, hon víkur og gevur rúm fyri, at **GUD GER ALT NÝTT:**
**NÝGGJAN HIMMAL –**
**NÝGGJA JØRÐ –**
og eitt **NÝTT JERUSALEM,** har tey 12 portrini eru 12 perlur, hvørt portur er ein stór perla, og gøturnar eru úr reinum gulli sum gjøgnumskygt glas. (Opb. 21,21).

Hvør skal búgva í hesum býi? Tað skulu øll tey, sum á hesi jørð hava ásannað og játtað, at **JESUS EINSAMALLUR ER**

**VEGURIN, SANNLEIKIN** og **LÍVIÐ** – og at eingin kemur til Faðirin – ella til hitt nýggja Jerusalem – uttan við Jesusi.

Hetta er aktuelt, tí vit skulu øll støðast í ævinleikanum í einum ella øðrum staði: **VIÐ JESUSI** – ella **UTTAN JESUS!**

Sjálvur Satan trýr Guds Orði, og hann veit, at tíð hansara er stutt – at hann hevur ein „seinasta søludag", og tann tíðin er skjótt farin. (Opb. 12,12).

*Effie Campbell* umsetti.

---

## Hvat er gudsótti?

Guds ótti er: **1.** at vera glaður at gera Guds vilja - **2.** at hava ótta fyri at gera ímóti Guds vilja - **3.** og alt, sum liggur har ímillum.

Róm. 8,15: „Tí at ikki fingu tit trældómsanda aftur til ræðslu, men tit fingu sonarrættaranda, sum vit rópa í: Abba, faðir!"

---

Áðrenn Jesus rópti Lázarus aftur til lívs, hugdi hann upp móti himli og segði: „... Faðir, eg takki tær, av tí at tú hevur hoyrt meg." Jóh. 11,41. Nakað undranarvert hendir, tá ið tú frammanundan takkar Gudi, at hann frelsir teg, verjir teg og hevur umsorgan fyri tær. Trúgvin lyftir seg upp, og tú fært dirvi at bjóða tí, sum tú fyrr helt, var deytt, aftur til lívs.

*e.c.* ums.

---

Onkur hevur sagt, at um vit vóru gjørd úr glasi, og fólk kundu sæð, hvat ið vit hugsaðu, so høvdu vit øll viljað búð á einari oydnari oyggj.

*e.c.* ums.

---

Hevur Gud ikki ætlað tær eitt pláss í søguni, so hevur hann ætlað tær eitt pláss í ríki sínum. Tað ræður bert um, at tú finnur tað.

*e.c.* ums.

---

Tað verður kravt av einum húshaldara, at hann er trúgvur.

*e.c.* ums.

---

Tankar føðast í einsemi. Tankar spjaðast í fjøldini.

*e.c.* ums.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 3. mars | **Tekstur:** | 1 Mós,42,1–29, 42,39–43,1–15 +32–33; 44 og 45 | **Bíbliuorð** | Sl. 32,1 |
| 10. mars | **Tekstur:** | **Pálmasunnudagur,** Matt. 21,1–9 | **Bíbliuorð:** | Matt. 21,5b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 6** ***17. mars 2024*** **84. árg.**

# Jesus kom sjálvur

Eini hjún úr Harstad vóru eitt kvøldið gestir í „Åpent studio“ á Visjon Norge.

Maðurin greiddi millum annað frá, hvussu tey upplivdu ringastu marruna, ið foreldur kunnu uppliva, tey mistu dóttur sína. Hon datt niður í eina silo, ein fullan tanga av korni, og hon kvaldist.

Tað vóru bara nøkur fá ár, síðani maðurin var umvendur; men alla hesa tíðina hevði hann tænt Gudi, og nú, tá ið hann misti dóttrina í einari sovorðnari vanlukku, brigslaði hann Gudi tað, sum hent var. „Hatta havi eg ikki uppiborið. Eg havi tó roynt at tænt tær av heilum hjarta,“ illneitaðist hann.

Men tann dagin, dóttirin skuldi fara til gravar, var allur beiskleiki horvin, og einki øvugt orð kom út um munn hansara.

Tey komu í góðari tíð yvir til kirkjuna, og maðurin setti seg uttanfyri á ein stein at biðja. Hann styðjaði albogarnar niður á knøini, og høvdið hvíldi niður á tær samanløgdu hendurnar, meðan hann bað: „Góði Jesus, nú mást tú styrkja okkum, so at vit orka at koma ígjøgnum hetta.“

Tá merkti hann alt í einum eina manshond, sum legði seg niður á økslina, og tá ið hann læt eyguni upp og hugdi niður í túnið, meðan hann soleiðis sat boygdur framyvir, sá hann ein fót í einari sandal. Tá ið hann hugdi aftur um seg, var eingin har.

Men við eitt var alt broytt. Alt tað beiska var burtur, og innaru sárini vóru grødd. Í Hásonginum 1,3 stendur í norsku Bíbliuni: „Ditt navn er en udgydt salve.“ Á føroyskum ljóðar hetta skriftstaðið soleiðis: „Eins og úthelt olja er títt navn.“ Ja,

sanniliga Jesu navn er ein salva, ið grøðir. Tað upplivdi hann bókstaviliga. Hann hevði biðið um styrki frá Jesusi, og Harrin gav honum ikki bara tað, hann bað um, nei, hann kom sjálvur og nam við hann, og Guds kraft fór niður ígjøgnum hann.

Hetta gjørdist eingin syrgilig jarðarferð. Dámurin inni í kirkjuni var ljósur og lættur, og hetta var meir eitt vekingarmøti enn ein jarðarferð.

Sjálvandi sakna tey dóttrina, eitt pláss er jú tómt. Men hina nívandi byrðuna hevur Jesus lyft av herðum teirra.

*Effie Campbell.*

# Guds vegur til frelsu

Teirra millum, sum av Guds náði komu til trúgv í 18. øld, meðan Dr. Haweis úr Aldwinckle var prestur, var ein gamal vertshúseigari. Hann hevði verið ein trúgvur kundi hjá sær sjálvum og hevði drukkið dúgliga úr sínum egnu víntunnum, og hin karfunkilreyða nøsin var líka sum ein ímynd um starv hansara.

Hann skuldi eitast at hoyra til metodistakirkjuna, men tá ið hann hendinga ferð kom á gátt har, var tað ikki av góðum huga. Hann dugdi ikki at skilja, hví øll har um leiðir so trúliga gingu í Aldwinckle kirkjuna.

Men av tí at honum dámdi so sera væl tónleik, og av tí at hann hevði frætt, at sangurin har var so frálíkur, kláraði hann vikuna eftir at ganga seks fjórðingar, at smoyggja sær undan einum drykkjugildi og kroysta seg niður í ein kirkjustól, sum var ov trongur til hansara føra kropp.

Har sat hann so og lurtaði við gleði eftir sálmasonginum; men tá ið prestur fór at biðja, stakk hann fingrarnar í oyruni. Av hitanum og møðini duttu eyguni saman, til ein fluga lendi á nøsini, tá tók hann hendurnar úr oyrunum at revsa henda óbodna gestin.

Júst tá las prestur við einari rødd, sum ljóðaði sum toran, tekstin til dagin: „Hann, sum oyru hevur, hann hoyri."

Ávirkanin var stór. Hendurnar fjaldu ikki oyruni longur. Ein nýggj kensla var vaknað innan í honum. Nú byrjaði eitt nýtt lív fyri hann. Eingin svørjan, eingin drykkjuskapur, men bønir og gudstænastur og møtigongd upptóku tíð hansara, og hann doyði eftir at hava fylgst við Gudi í 18 ár, glaður í

vónini, og hann vælsignaði tann mannin, sum var amboðið til umvending hansara.

*„Cheering Words“ 4/92. – Effie Campbell* umsetti.

# Vegurin út úr mótloysi

*Jostein Krogedal*

*„Tí at ikki gav Gud okkum mótloysis anda, men kraftar og kærleiks og hóvsemis anda.“ 2. Tim. 1,7.*

Eg havi ongantíð hitt nakað menniskja, sum ikki onkuntíð hevur verið mótleyst. Annaðhvørt ert tú har nú, ella so hevur tú verið har einaferð. Mótloysi er einki gott stað at vera staddur í. Summi fólk hava eitt ófórt sjálvsálit, meðan onnur ikki tora at fara inn í ein møtisal av berum bangilsi.

Okkum tørvar dirvi at stíga næsta stigið. Gud hevur lagt ónýttar møguleikar niður í øll menniskju, og hesar skulu vit brúka og menna. Men ofta missa vit mótið. Mótloysi er ein av nútíðar sjúkum. Hon tekur frá okkum trúnna á okkum sjálv. Tá ið eitt barn dettur, reisist tað og gongur víðari. Barnið sigur ikki, at hann ella hon er mótleyst; tað reisist, tekur nýggj stig og herjar á aftur.

Í Dóm. 7,3 lesa vit, hvussu Gud var við fólki sínum, men um onkur var fullur av ótta og mótloysi, kundu tey fara heim aftur til húsa. Hetta varð gjørt, av tí at teirra mótloysi kundi smitta yvir á hini, so at tey eisini mistu mótið og so sviku og kastaðu frá sær.

Í 1. Sám. 17,23 lesa vit, hvussu neiligu orðini hjá Goliati tóku mótið frá fólki, men í 1. Sám. 17,32 síggja vit, hvussu Dávid vendir støðuni, tá ið hann sigur við Saul: „Eingin av monnunum má falla í fátt av honum.“ Jalig tala kann byggja upp aftur tað, sum tey neiligu orðini hava trýst niður.

Gud gav okkum ikki mótloysis anda, men kraftar og kærleiks og hóvsemis anda. Eg brenni fyri at náa tey kirkjufremmandu við evangeliinum um Jesus. Vit eiga at stuðla teimum mótlítlu og rósa teimum fyri tað, tey eru, og ikki fyri tað tey gera.

Bíblian vísir okkum trý sløg av andum: Guds Anda, mín egna anda og teir illu andarnar. Fortíðina fært tú einki gjørt við. Best er at lata hana liggja. Ver saman við fólki, sum lyfta teg upp, menniskjum sum fáa verk í lag og orka. Bygg trygg og

góð vinaløg við slík fólk. Hugsa rættar tankar og set rætta kós í lívi tínum. Bíblian er full av menniskjum, sum møttu Jesusi og fingu nýtt mót og eitt nýtt lív eftir at hava møtt Honum.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Sjelen den trenger til hvile.
Hva skal vel bringe den ro?
Skal jeg kun frykte og tvile?
Nei, jeg på Jesus vil tro!

**KOR:** *Det eneste håp som jeg eier,*
*det har jeg o, Jesus, i deg.*
*Jeg bringes til ro, ved enkelt å tro,*
*at du døde på korset for meg.*

Ofte jeg vandret bedrøvet,
skuffet, mismodig jeg var.
Golgata håp jeg behøvet,
det som all ufred borttar.

Fullkommen lykke jeg eier,
fred i mitt hjerte nå bor.
Troen på Golgata seier,
bringer meg livslykke stor.

**Tekst og tone:** *Øyvind Fragell.*

---



**SUNNUDAGSBLAÐIÐ**
***ynskir øllum einar gleðiligar páskir í Jesu navni!***



---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 17. mars | **Tekstur:** | **Langafríggjadagur,** Matt. 27,31b–51+54 | **Bíbliuorð:** | Matt. 27,54c |
| 24. mars | **Tekstur:** | **Páskadagur,** Matt. 28,1–15 | **Bíbliuorð:** | Matt. 28,6a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74